## Trygg ferðsla gjøgnum bygdina

**Tjørnuvík:** Nú skal gerast nakað fyri ferðslutrygdina í bygdini.

Á bygdaráðsfundi í gjárkvøldið var eitt uppskot fyri um ferðsluviðurskiftini í Tjørnuvík. Hetta uppskotið kom fram eftir áheitan frá tveimum kvinnum í bygdini.

Hesar kvinnur hava heitt á kommununa um at gera eina vegforðing við brúnna um Stóra, og í øðrum lagi at seta forboð fyri, at bilar sum eru størri enn 3,5 tons sleppa at parkera inni í bygdini.

Grundgevingarnar í áheitanini eru, at tað er til stóran ampa fyri børnini í bygdini at bilarnir koyra ov skjótt. Í øðrum lagi varð sagt, at bygdin er trong, og at eitt parkeringspláss longu er til stórar bilar, áðrenn ein kemur inn í sjálva bygdina.

Tekniska nevndin í býráðnum hevur viðmælt hesi umsóknini, og á fundinum í gjárkvøldi var tí eitt uppskot til samtyktar sett til viðgerð.

**sb.**



*Tjørnuvík er vøkur bygd, og har vitja nógvir bilar. Men nú skal so gerast nakað fyri, at ferðslutrygdin eisini kemur til sín rætt inni í bygdini*

## Økt tal av innleggingum

**Psykiatriskur depil:** Talið av teimum, ið verða innløgd á tær psykiatrisku deildirnar øktist í 2004 við nærum 10 prosentum.

Í ársfrágreiðingini fyri 2004 sæst, at á Psykiatriska Deplinum á Landssjúkrahúsinum vórðu 402 sjúklingar innlagdir í fjør, og av hesum vóru tey 260 akutt innløgd. Í fyrra førinum var talan um eina øking uppá 9,5 % og í seinna eina øking uppá 0,4 %.

Samlaða talið av seingjardøgum og sjúkradøgum er økt við 5,3 % í mun til árið fyri. Hesi tølini vóru ávikavist 22.093 og 22.495.

Eitt av nýggju arbeiðsøkjunum á Psykiatriska deplinum er tann sonevnda økis-psykiatri'in, har ein miðar eftir at skipa fyri viðgerð úti um landið. Hetta arbeiðið byrjaði í fjør, tá játtaðar vórðu 2 mió. kr. til endamálið.

**sb.**

## Dáma væl at skata

**Hósvík:** Líkt er til at børnunum í Hósvík dáma væl at skata.

Í øllum førum hevur tann gamla kommunan – Hósvíkar kommuna – í síni tíð havt eitt uppskot til viðgerð um at fáa eina serstaka breyt til íðkanina av skateboard.

Hetta uppskotið varð játtað, men seinni broytt til at kommunan eisini skuldi byggja hesa breytina. Einki var kortini játtað av peningi til endamálið.

Nú er málið komið fram aftur í nýggju kommununi, men samstundis hevur tað reist ein annan spurning: Trygdin. Tí hevur umsitingin í Sunda kommunu biðið Tryggingarfelagið um at kanna, hvørja ábyrgdartrygging sum kommunan skal hava um skaðar henda børnunum.

Á bygdaráðsfundinum í gjárkvøldið skuldi bygdaráðið taka støðu til eitt uppskot um at kommunan letur eitt øki til hetta endamálið. Hetta økið er sunnanfyri vøllin í bygdini.

**sb.**

# Serstakur stovnur til serstøk børn

**Børn við serligum tørvi hava higartil einki nøktandi tilboð havt her á landi, men nú skal vend koma í. Ein serdagstovnur til eini 10 børn verður nú fyrireikaður, og í næstum verður leiðari settur**



*Hans Pauli Strøm fær handað álitið frá arbeiðsbólkinum – v.m.: Hans Pauli Strøm, almannaráðharri, Súsanna Nolsøe, Beinta Festirstein, Beinta Johannesen, Súsan Johansen, Terje Kollsker og Sigrun Samuelsen. Á myndini vantar Hanna Kampmann*

ALMANNAMÁL
*Snorri Brend*

**Serstovnur:** Ætlanin er at fara undir ein serdagstovn fyri hesi børnini, sum ikki hava eitt nøktandi ansingartilboð. Og hetta skal henda so skjótt sum tilber.

Gongd er av álvara komin á hetta málið: Í fjør varð ein bólkur settur at fyrireika ein slíkan stovn. Í farnu viku var lýst eftir leiðara til henda serdagstovnin. Og fyrrapartin í gjár fekk Hans Pauli Strøm handað eitt væl undirbygt álit um, hvussu ein slíkur stovnur kann hava umsorgan fyri júst hesi børnini.

Hesin bólkurin byrjaði arbeiði sítt á sumri í fjør, tá mikil umrøða var um ein ávísan drong, sum mátti av landinum, hóast mótmæli frá mongum síðum.

Arbeiðsbólkurin helt kortini fram við arbeiði sínum, og hevur nú lagt fram hetta álitið. Hetta er eitt álit um eina føroyska heildarætlan fyri, hvussu ein slíkur føroyskur stovnur kann virka til fulnar í Føroyum.

Tá nýggi leiðarin er settur verður farið undir at leita eftir hóskandi hølum. Men tað fer helst at ganga enn ein tíð enn, áðrenn hesin stovnurin fer at virka til fulnar.

- Við hesum væl útgreinaða álitinum kunnu vit nú fara til verka. Eingin orsøk er at leypa framav, tí umráðandi er at finna bæði rætta leiðaran og røttu hølini til endamálið, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Hann vónar kortini, at ein kann fara undir henda stovnin av álvara longu í heyst.

### Hjálp og stuðul

Í tilmælinum hevur bólkurin natúrliga hugt eftir, um hesin stovnurin skuldi vera ein dagstovnur ella ein samdøgurstovnur.

Bólkurin hevur her verið á einum máli um, at tørvurin her og nú er størstur á einum dagstovni.

Henda metingin er gjørd út frá eini meginreglu um minstainntriv. Hetta merkir aftur, at atlit skulu takast til tørvin hjá barninum, samstundis sum ein trívir minst møguligt inn í gerandislívið hjá barninum og familjuni.

- Har tað er møguligt, eigur at skipast so fyri, at barnið verður búgvandi heima hjá foreldrunum, og at sett verður inn við hjálp og stuðli í heiminum um neyðugt, verður sagt.

Skipanin verður hon, at hesi børnini í fyrsta umfari kunnu koma inn í ein vanligan dagstovn, men so við ávísum millumbilum koma inn á henda serdagstovnin til viðgerð. Tá henda viðgerðin er liðug, fara børnini so aftur í vanliga dagstovnin.

Hinvegin so er ikki óhugsandi, at einstøk børn fara at hava tørv á rættiliga langari viðgerð á serdagstovninum.

**FAKTA**

**Børnini**

Børnini hava álvarsligar kensluligar og sosialar trupulleikar. Hesir eru so umfatandi, at tey hava stóran tørv á hjálp í tí umhvørvinum, tey eru í. Tey hava atferðarórógv, eru ófriðarlig, hyperaktiv; hava trupulleikar í samspælinum við onnur børn; tey hava vánalig bindindi og søkja samband negativt.

Íalt eru 34 børn í aldrinum 0 til 7 ár við slíkum trupulleikum: Av hesum búgva 17 í Suðurstreymoy og 8 í Eysturoy. Hini 9 búgva aðrastaðni í Føroyum. Kynsbýtið er 4 gentur og 34 dreingir.

### Serstøk krøv

Børn við slíkum atferðartrupulleikum eru sera viðbrekin, og megna ikki at vera við í einum stórum bólki. Tey hava tí stóran tørv á einum tryggum, friðarligum og skipaðum umhvørvi.

Bólkurin skjýtur tí upp at byggjast skal ein nýggjur stovnur til endamálið. Men slíkt krevur bæði tíð og pening, og tí er neyðugt at finna fram til onnur høli, ið ein má leiga ístaðin.

Seta hesi børnini stór serstøk krøv, so verða eisini serstøk krøv sett til ein slíkan stovn. Hann skal í fyrsta lagi hava góða rúmd, vera væl ljóðisoleraður, eins og hann skal hava fleiri viðgerðarrúm til fakfólkini sum koma á staðið at viðgera børnini.

Hinvegin so kann hesin stovnurin eisini koma at virka sum ein ráðgevandi stovnur fyri aðrar dagstovnar kring landið. Út frá hesum kann hann eisini koma at virka sum ein miðdepil fyri slíka serstaka vitan.

### Í miðstaðarøkinum

Eitt annað áhugavert mál í hesum sambandi er eisini, hvar stovnurin skal liggja. Av tí at stovnurin skal kunna taka ímóti børnum hvønn einasta dag, má hann liggja soleiðs fyri, at so mong sum tilber fáa gagn av honum.

Dagstovnurin skal eisini hava samstarv við serkøn starvsfólk m.a. á Psykiatriska deplinum og Sernámsdeplinum.

- Sæð út frá hesum so liggur dagstovnurin best í miðstaðarøkinum. Og sambært skrásetingini so búgva eisini flest børn við trupulleikum í atferð og tilknýti í miðstaðarøkinum, sigur bólkurin.

Kostnaðarætlanin fyri serdagstovnin er í ár mett til góðar 2,5 mió. kr.

**Arbeiðsbólkurin**

Arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum var hesin:

1) Hvørji børn er talan um, og hvønn serligan tørv hava tey
2) Hvussu nógv børn eru í øllum Føroyum við serligum tørvi, og hvar búgva tey
3) Hvussu skal stovnurin verða mannaður, og hvørji fakfólk skulu arbeiða har
4) Hvar eru hóskandi høli
5) Hvussu kann ein kostnaðarætlan síggja út.

**Í bólkinum hava sitið:**

Súsanna Nolsøe, cand. scient. adm. fyri Almanna- og heilsumálaráðið
Sigrun Samuelsen, sálarfrøðingur fyri Tórshavnar kommunu
Beinta Festirstein, løgfrøðingur fyri Almannastovuna
Terje Kollsker, sálarfrøðingur fyri Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum,
Hanna Kampmann, sálarfrøðingur fyri Sernámsdepilin
Súsan Johansen, sosialpedagog fyri Rókina á Argjum
Beinta Johannesen, sosialráðgevi fyri Føroya Barnaheim.

Arbeitt hevur verið síðani á sumri í fjør, og í gjár fekk so Hans Pauli Strøm, almannaráðharri handað 13 síðu stóra álitið.